## Varandi arbeiðsloysi

Altjóða samfelagið skal brynja seg við toli í hesum kreppután, tí væntandi fer arbeiðsloysið at standa við í einar átta ella kanska tólv mánaðir afturat. Tað heldur í hvussu er aðalstjórin í Altjóða Gjaldoyragrunninum, Dominique Strauss-Kahn. Grunnurin hevur hildið fund í Istanbul, og tað var á tíðindafundi har, at IMF-stjórnin kom við sínum dapra spádómi. Hann segði, at arbeiðsloysið er ovasta málið á dagsskránni í Istanbul, har øll tey 186 limalondini eru umboða. IMF-stjórin legði afturat, at í menningarlondum kann arbeiðsloysið vera ein spurningur um lív ella deyða.



## Einki lán enn

Fyrradagin fingu íslendingar tilsøgn um lán úr Póllandi, men teir noyðast eftir øllum at døma at brynja seg við toli, táð tað snýr seg um eitt tilsvarandi lán frá russum. Russiska stjórnin hevur langt síðani sagt seg vera sinnaða at læna íslendingum 500 milliónir dollarar, men tað dregur út við teirri endaligu tilsøgnini. Í gjár hitti íslendski fíggjarmálaráðharrin, Steingrímur J. Sigfússon, russiska starvsbróðurin Alexei Kudrin, mrn hrldur ikki tá fekst endalig semja. Kudrin segði aftan á fundin, at samráðingarnar halda fram, tí russar ætla at kunna seg betur um viðurskiftini í Íslandi.

# Tvøroyrar Býráð vil selja skúlan av neyð

**Tað er av neyð, at Tvøroyrar Býráð hevur bjóðað skúlan í Trongisvági fram til eftirskúla. Ein ótti hjá býráðslimum, er, at stóri skúlin á Tvøroyri verður stongdur so at tey størru børnini verða noydd í aðrar bygdir at ganga í skúla**

EFTIRSKÚLI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Býráðslimir á Tvøroyri sigur, at tey hava bjóðað skúlan í Trongisvági fram til eftirskúla fyri at hava ráð til at hava ein góðan skúla í býnum ístaðin fyri tveir, sum tey ikki hava ráð at halda. Annars stúra tey fyri, at tey missa framhaldsdeildina av Tvøroyri. Hesa myndina av skúlanum í Trongisvági tók TuriðV*

Tað er av fíggjarligari neyð, at Tvøroyrar Kommuna hevur bjóðað skúlan í Trongisvági fram til eftirskúla.

Tað var niðurstøðan á býráðsfundi í Tvøroyri í gjárkvøldið.

Á fundinum gjørdu at kalla allir býráðslimir púra greitt, at talan var ikki um, at Tvøroyrar Kommun longu hevur avhendað skúlan í Trongisvági til eftirskúla.

Talan er einans um eitt tilboð og verður tikið av tilboðnum, kann tað geva kommununi einar 22 milliónir í kassan.

Tann peningurin skuldi allur sum hann er, markast til at umvæla og útbyggja tann stóra skúlan á Tvøroyri, sum er í sera ringum standi.

Samstundis var ført fram, at fíggjarliga støðan hjá kommununi er so vánalig, at hetta er rætt og slætt einasti møguleiki hjá kommununi yvirhøvur at umvæla skúlan.

Kommunan hevur ikki ráð at umvæla skúlan, og hon fær ikki lán til at gera tað, tí hon er so skuldarbundin frammanundan.

### Kunnu missa skúlan

Eitt, sum býráðslimir óttaðust, er ætlanin hjá Helenu Dam á Neystabø at savna fólkaskúlan í færri, men størri skúlar og at niðurleggja aðrar skúlar.

Býráðslimir á Tvøroyri stúra nevniliga fyri, at skúlin á Tvøroyri er í so vánaligum standi, at hann fer ikki at verða góðkendur at hava skúla í.

Avleiðingin kann skjótt verða, at allir teir smærri klassarnir verða lagdir inni í skúlanum í Trongisvági og at børnini í framhaldsdeildini verða flutt til Vágs ella onkra aðrastaðni at ganga í skúla, stúra býráðslimir á Tvøroyri fyri.

Samstundis varð ført fram, at tað kostar 50 milliónir at byggja skúlan í Trongisvági út til at hýsa øllum børnunum, og tað hevur kommunan undir ongum umstøðum ráð til.

Men kommunan hevur heldur ikki ráð til at umvæla skúlan í Trongisvági, og avleiðingin av tí verður, at um fá ár kann hann vera í líka ringum standi, sum skúlin úti á Tvøroyri.

Og so eru tveir uppslitnir og óbrúkiligir skúlar í kommununi, siga býráðslimir, sum sostatt heldur vilja savna allan skúlaskapin í einum og sama skúla, sum tey fáa ráð at halda.

Og tað vóru fleiri býráðslimir, sum søgdu, at tá ið teir tóku undir við at bjóða skúlan í Trongisvági fram til eftirskúla, var tað eina og aleina fyri at útvega fígging til at dagføra skúlan á Tvøroyri.

# Ongin avgerð smoygd niðuryvir tvørafólk

Tað elvdi til eitt ramaskríggj, tá ið tað kom fram, at Tvøroyrar Býráð hevur bjóðað skúlan í Trongisvági fram til eftirskúla.

Bæði skúlastýrið og skúlaleiðslan hava mótmælt, og á býráðsfundinum í gjárkvøldið handaði ein foreldrabólkur borgarstjóranum, Kristin Michelsen, ein lista við 237 undirskriftum frá tvørafólki, sum mótmæltu ætlanini og framferðini hjá býráðnum.

Serliga átala tey, at býráðið tekur eina slíka avgerð uttanum allar skúlamyndugleikar á staðnum, uttan at kunna foreldrini og uttan at greiða frá, hvussu ætlanin er at skúlagongdin skal vera framyvir.

Á fundinum royndu býráðslimir at sissa fólk og í tí sambandi varð gjørt púra greitt, at ongin avgerð er tikin, og tað verður heldur ongin avgerð tikin, fyrrenn skúlastýrið og skúlaleiðslan eru hoyrd og tikin við upp á ráð.

Sostatt skal ongin avgerð smoyggjast niður yvir tvørafólk.

- Tað einasta, býráðið hevur gjørt, er at bjóða skúlan fram. Endar politiska telvingin við, at mentamálaráðið er sinnað at taka av tilboðnum, verður málið lagt fyri býráðið aftur, og tá verða bæði skúlastýri og skúlaleiðsla hoyrd og tikin við upp á ráð, staðfestu býráðslimir.

Annars kom fram á fundinum í gjárkvøldið, at Tvøroyrar býráð er ikki samt í málinum. Jens Johannesen úr Javnaðarflokkinum vil heldur bjóða skúlan á Tvøroyri út til eftirskúla og byggja skúlan í Trongisvági út, so hann kann hýsa øllum børnunum.

Men hann fekk greitt at vita, at tað hevði kommunan yvirhøvur ikki ráð til.

Malla Dam, eisini úr Javnaðarflokkinum, hevði tikið undir við ætlanini, men mælti til at taka støðu av nýggjum, í hon helt, at hon hevði tikið støðu útfrá skeivum fortreytum.

Hon segði, at síðani samtyktina í býráðnum er hon komin eftir, at býráðið kann ikki taka eina avgerð um slíkar bygnaðarbroytingar, uttan at hava hoyrt skúlamyndugleikarnar á staðnum fyrst, og tað er ikki hent enn.

Aðrir býráðslimir førdu fram, at talan er ikki um bygnaðarbroytingar, men um at taka støðu til ein skúlabygning, sum kommunan átti og einsamøll hevur ræði á.Og tað er bara sjálvan skúlan, sum Býráðið hevur bjóðað fram til eftirskúla. Ítróttarhøllin, skiftirúm og tað, sum annars hoyrir til høllina er ikki við, og eftiskúlin má so gera avtalu við kommununa um at brúka hann, saman við øllum ítróttarfeløgunum og øðrum, sum annars brúka høllina. Avtala skal eisini gerast við dagrøktina, frítíðarskúlan og útibarnagarðin, um økið uttanfyri skúlan.